## Aastrid hjá Bakka Jógvan úr Fuglafirði níti ár týsdagin 26. mars



Nøkur fólk á Bakkanum bóru staðarnavnið við sær. Nevnast kunnu Danjal á Bakkanum, Zacharis á Bakkanum, Bakka Malena, Bakka Pól, Bakka Jógvan og Óli á Bakkanum. Astrid hjá Bakka Jógvan fekk spjaldur sítt frá manninum, og er tað bæði tignarligt og elskuligt.

Tá ið vit festu búgv Norðuri í Bø, gingu Jógvan og Astrid, Elin og Kristjan, Erling og Mimi, Torstein og faðir og móðir oman og niðan eftir Falkarás og stukku inn á gólvið hjá sær og sínum.. Tað var ikki so langt at fara, og var hetta javnan at onkur var at síggja, sum antin kom niðan ella fór oman brekkuna. Løturnar fyltust við látandi orðum og tonkum, sum lá hjartanum næst.

Nú er tann tíðin farin. Hesar løtumyndir eru festar í minni og eru tær ikki so fáar. Astrid hevur síðstu tíðina búð hjá dóttrini Zachariu. Hon hevur sitið um dagarnar framman fyri køksvindeygað og bundið. Stokkarnir hava gingið so listiliga, og er hetta bert ein lítil partur av tí, sum hon hevur greitt úr hondum í sínum langa lívi. Hendurnar sótu væl og sigast kann, at mikil skaldskapur er í hesi kvinnu, sum ikki altíð hevur dansað á rósum, men arbeiðsom og trúføst hevur hon altíð verið. Blíðskapurin hevur verið óførur, og mangur hevur sitið væl inni hjá Astrid og Bakka Jógvan.

Minnist frá barnsbeini av Kathrinu Mikkelsen, sum var gunmma Astrid og var av Skipanesi. Hon dugdi væl til hendurnar og seymaði fyri fólk. Hon tók hana til sín, og varð hon borin út hiðani. Væl varð hon havd undir bitunum hjá Atrid og Bakka Jógvan.. Tað sama kunnu vit siga um verðmóðir hennara, Bakka Malenu. Mannin, Jógvan, passaði hon til seinast og síðst eisini.

Sum hjá so mongum slerdi afturíaftur hjá Astrid og Jógvani. Sonurin, Zacharis, druknaði niðri við Stóru brúgv. Rudolf fór, har æviskeið hansara kundi verið væl longri. Síðsta mikudag fór ommusonurin, Jógvan bóndi, fyri bakka og doyði.

Hann, sum valdar øllum, telur løturnar øðrvísi enn vit mannabørn gera. Eingin skal um sín dag ganga, men hjá nøkrum ber lagnan mangan trega og sorg við sær á ævini, har løturnar eru tungar at koma ígjøgnum. Hóast trega og trongdir hava tey, sum rakt verða, eina lívsvón, sum aldri doyr. Eitt ljós skýnir í myrkrinum… á ja, sólin fer aftur at skýna millum tey dimmu, blágráu skýggini á himnahválvinum.

Tey byggja land, ið liva… og Astrid hevur bygt land stillisliga, samvitskufull uttan háva og reyp. Hetta er henni til mikla tign og miklan sóma.

Heil og sæl, Astrid! Hjartaliga til lukku við teimum níti árunum og takk fyri manga løtuna á Bakkanum.

**Frits**

# Ravnur drepur ikki har hann byggir

**Grækarismessurøðan 2002, sum Frits Johannesen helt í Fuglafjarðar skúla**



*Frits Johannesen*

Nógvar eru søgurnar um fuglar og djór. Ein er søgan tann, at tveir bátar av Hellunum, Karis og Hvalurin, vóru á veg aftur av útróðri av Stapanum. Hetta var í lembingini 1941 Meðan teir sigla suðureftir, síggja teir ein fugl koma flúgvandi frá Oyndfjarðarfjalli við onkrum í klónum. Fuglurin flýgur heldur lágt og orkar ikki at bera hesa byrðu - lítil byrða er um langan veg tung, men henda byrðan, sum hesin fuglur hevði sett klørnar í, var í so stór. Hetta var ein ravnur, ið hevði verið á veiðiferð, og hevði hann tikið eitt lamb í Trølldali. Hann misti flogið og dalaði niður ímóti vatnskorpuni, og til síðst slepti hann fongi sínum. Menninir á Hvalinum ( Hans J., Ansgar og Petur Kristjan) vendu og fingu fatur á lambinum, og tað livdi. Við Karis vóru Alfred, Símun og Johannes Brúðarfoss.

Ravnur drepur ikki, har hann byggir. Hetta var óivað ein ravnur úr Norðoyggjum, sum hevði verið á veiðiferð og hevði ætlað at fáa sær ein góðan bita úr Eysturoynni, men orkaði ikki, sum vera man, at flúgva við lambinum um Djúpini yvir á Kalsoynna, har hann aftur hevði fingið fast undir fótinum og kundi gjørt sær dælt við henda feita bitan..

Tað hevur verið ein fragdarløta umborð á bátinum, tá ið menninir løgdu at landi í Oyndarfirði og lótu lambið frá sær. Teir bóðu nakrar dreingir fara niðan til Heina í Hoygarðshúsi og biðja hann koma oman eftir lambinum. Heini kendist við lambið. Tað hevði felagsmerkið Norðuri í Fjalli - stívt á høgra. Hann hevði verið í haganum um morgunin og hugt eftir seyði. Var komin fram á hetta lambið, sum var nýlembt og hevði markað tað.. Røktingarmaðurin kendi lambið aftur og visti, hvør ærin var, sum átti tað. Hann fekk móðrini lambið aftur.

Hetta er ein søga frá tí dagliga lívinum, sum er sonn. Einki vita vit um hvussu glað, ið ærin var, tá ið hon fekk smálambið aftur, og ei heldur vita vit, hvussu nipin ravnurin var, tá ið hann so nakkalangur kom heimaftur av veiðiferð, og einki hevði at bera svongu ungum sínum..

Tjaldrið fer aldri á ránsferð. Tað lívgar og verjir økið, har tað búleikar og sampakkar væl við aðrar fuglar. Ja, tú kanst gott koma á eitt øki, har bæði likka og tjaldur eiga hvørt um annað, og eru tey so góð, at ikki nápa tey t. d. egg hvørt frá øðrum. Her er ein óskrivaður sáttmáli gjørdur teirra millum, at tey skulu liva í sátt og semju sínámillum og verja reiður og ungar ímóti øðrum ókunnufuglum, sum koma sum ófrættagestir at fáa sær okkurt niður í kjósina, t. d. eitt egg ella ein unga.

Í skúlanum royna vit at fáa øll undan sum best. Næmingar og lærarar arbeiða saman um lærigreinirnar og veita hvør øðrum íblástur, eru góð hvør við annan, góð við t. d. tað føroyska málið - eins góð sum likkan og tjaldrið eru tað yviri á Góðadali, har tey liva væl saman dyr um dyr.

Av og á ilskast tit inn á onkra lærigrein og kanska onkran lærara við, tí alt er so " moðið og einki kul". Tú kundi hugsa tær at verið sum ravnurin, sett klørnar í lærara og lærigrein og lyft tey upp á Lorvíksfjall og bart tey av har uppi.

Ravnurin tók eitt heilt smálamb og vildi bera tað til reiðrið, har hann skuldi geva sínum ungum henda feita bitan, men rakk hann ikki so langt. Ja, tit siga kanska: Fast taki honum, men í natúrini eru heilt aðrar lógir galdandi, enn vit duga at meta um. Har er ein eirindaleys kapping um at yvirliva, og onkuntíð verður sagt: Hvør av øðrum liva má. Ei heldur kunnu vit klára okkum sjálvi. Vit mugu liva saman við øðrum fólki, fáa hjálp frá øðrum og veita øðrum ein lætta bæði so og so.

Tjaldrið eru vit góð við, men ikki ravnin. Hann drekkur egg, leggur á smálomb, er krunkasvartur og melið er sum á einum skurrandi, elligomlum bassi, sum púrt einki nyttar. Nei, vit vilja heldur hoyra yndisljóðið frá tjaldrinum - eitt klipp! Tá ið vit hoyra hetta sæla ljóð, so vita vit, at várið er í hondum, og ljósari tíðir eru framman fyri stavn.. Hetta gleða vit okkum til. Børninui telja tjøldrini, sum tey fáa eyga á og kappast um at síggja flest tjøldur. Eg veit ikki, um nakað barn hevur talt ravnar. Nú er ravnurin ein støðufuglur, so skuldu vit farið at talt ravnar, fór hetta at verða á ein annan hátt.

Vita tit, hvat eg haldi? Vit skulu eisini vera góð við ravnin, tí at hann er eisini ein vakur fuglur, hóast hann ikki er so menniskjansligur sum tjaldrið og ikki er so litfagur sum tað. Nei, hann er einans svartur. Hava tit nakrantíð sæð ravnar um ein svartan deyðseyð í kava, har tað svarta er svartari enn svart, og tað hvíta er hvítari enn hvítt? Ikki so fáir blóðdropar litka tann hvíta kavan. Síggja tit ikki, hvussu føgur henda myndin er? Ja, hetta er nakað fyri tykkum at avmynda.

Vit eiga at eira lív, á sama hátt, sum tjaldrið verjir um seg og síni og grannalagið, men ikki mugu tit vera sum ravnurin at eyðræna, taka tað, sum ein annar eigur, men hóast tað, so mugu vit vera góð við ravnin, tí hann prýðir eisini um natúrina.

Veturin hevur verið harður at koma ígjøgnum. Hann hevur verið eirindaleysur ímóti harunum, seyðinum og fuglunum. Á fellisárum er ravnurin feitastur, so løgið tað ljóðar.

Tjaldrið er tjóðarfuglur okkara, og tjaldrið skulu vit vera góð við. Okkum leingist eftir at síggja teg, tjaldur, og vit gleða okkum til at hoyra teg aftur. Tú lívgar um okkum, natúrina og boðar frá, at nú fer skjótt at spretta. Tjaldur ver vælkomið til okkum heim…



# Sjúklingabuss til psykiatrisku deild

**Tey á psykiatrisku deild á Landssjúkrahúsinum siga, at tað leingi hevur verið saknur á einum minibussi til sjúklingar. Tí skipar Áhugabólkurin fyri sjúklingabussi til psykiatrisku deild fyri einum almennum tiltaki leygardagin 6. apríl**

TILTAK
*Ingrid Bjarnastein*

Grundin til, at psykiatriska deild ynskir sær ein sjúklingabuss er fyri, at sjúklingarnir undir innlegging kunnu varðveita síni rættindi og sínar møguleikar at brúka almenn tilboð í samfelagnum. Hetta verið seg framsýningar, Norðurlandahúsið og gera túrar út á bygd ella bara fara út í náttúruna at hugna sær.

Áhugabólkurin fyri sjúklingabussinum sigur, at fleiri aðrir búfólkastovnar hava leingi havt flutningaakfør av hesum slagi, og tí er ein áhugabólkur av starvsfólki farin undir at savna inn pening til ein minibuss.

– Enn restar nógv í, og í tí sambandi hava vit heitt á kent listarfólk og annars bæði kommunu- og landspolitikkarar um at lata listarverk til eina almenna uppboðssølu til frama fyri sjúklingabussin, sigur áhugabólkurin.

Henda uppboðssølan verður í veitsluhøll Landssjúkrahúsins leygardagin 6. apríl. Beint áðrenn verður pallborðsfundur um nýggju psykiatriætlanina, hann byrjar klokkan 14, og væntað verður, at uppboðssølan kann byrja umleið klokkan 17. Men longu áðrenn pallborðsfundurin byrjar verður møguleiki at síggja listarverkini.

# Strongdir bussførarar eru ein vandi í ferðsluni

**Á heimasíðuni hjá Ráðnum fyri Ferðslutrygd stendur at lesa, at bussførarar, ið eru strongdir, eru eitt vandamál fyri ferðsluna**

FERÐSLA
*Ingrid Bjarnastein*

Á heimasíðuni hjá Ráðnum fyri Ferðslutrygd er skrivað um ein bussførara, sum hevur koyrt býbuss í Havn í fleiri ár. Hann hevur sagt upp nú, tí arbeiðið er alt ov strævið, vaktirnar ov langar og ferðslan trupul og ógvuslig. Bussførarin sigur, at ætlanin, sum bussarnir koyra eftir, er alt ov strømm, og bussførararnir noyðast tí ofta at koyra skjótari enn loyvt er og noyðast teir eisini at vera frekir í ferðsluni. Tí er tað nærum sjálvsagt, at undir slíkum umstøðum er ferðslutrygdin ikki nóg góð.

Umframt ferðsluvandan kann henda drúgva koyringin, sum er ein kapprenning við tíðina, eisini verða vandamikil fyri bussførararnar og heilsustøðu teirra. Bussførarin, sum nú hevur sagt seg úr starvi, endaði á deild 8 á Landssjúkrahúsinum við hjartatrupulleikum.



*Bussførarar við strongd eru vandamiklir í ferðsluni*

### Kanningar gjørdar

Kanningar í Danmark hava staðfest, at bussførarar eru í einum serligum vandabólki, tá talan er um blóðpropp í heilanum – vandabólkurin er tann størsti av vandabólkunum í Danmark. Hesin trupulleikin heldur veksur enn minkar. Tað eru umleið 80% meira sannlíkt, at ein bussførari verður raktur av blóðproppi enn onnur. Fyri 10 árum síðani vóru prosentini á 40.

Í øllum grannalondum okkara eru reglur gjørdar fyri, hvussu leingi ein bussførari hevur loyvi at sita við róðrið uttan steðg. Men í Føroyum eru ongar reglur um koyri- ella hvílitíðir. Ferðslutrygd hevur, eftir áheitan frá føroyskum bussførarum, heitt á avvarðandi myndugleikar um at taka málið til viðgerðar. Skriv varð sent millum annað til Vinnumálastýrið, sum svaraði, at sjónarmiðini hjá Ráðnum fyri Ferðslutrygd eru tikin til eftirtektar, og verða havd í huga tá broytingar og tillagingar verða gjørdar á økinum.

# Fríði spæla í Baren á TV3

**25 ára gamli Fríði Øster skal tann 9. apríl, saman við bólkinum hjá sær, Robbie Williams Jam, spæla á Baren í Christianshavn í Keypmannahavn**

TÓNLEIKUR
*Ingrid Bjarnastein*

Reality-sendingarnar vinda uppá seg, og føroyingar gera vart við seg nærum allastaðni. Fyri stuttum sóu vit Róin Siggertson royna seg sum sangara í sendingini Rockidoler á TV3. Onkur føroyingur hevur eisini roynt seg í Robinson Ekspeditionen, sum TV3 eisini stendur aftanfyri, og í løtuni sendir TV3 sendingina Baren 2002. Ongin føroyingur er við, men føroyingar fáa teirra part við hóast alt. Týskvøldið 9. apríl skal Fríði Øster saman við bólkinum hjá sær nevniliga spæla í Baren á Christianshavn í Keypmannahavn.

– Hetta er ein rættiliga nýggjur bólkur, sum eitur Robbie Williams Jam, greiðir 25 ára gamli Fríði Øster, sum sjálvur spælir trummur, frá.

– Vit vórðu stovnaðir beint eftir nýggjár í ár, og vit spæla bara cover-løg hjá Robbie Williams. Hinir í bólkinum eru danskarar, sum koma frá ávíkavist Odense og Fredricia.

Fríði sigur, at bólkurin er stovnaður bara fyri at hava tað stuttligt og fyri at fáa eitt sindur av pengi burturúr.

– Tá tú bara spælir cover-løg, so er ringt at hava nakað hægri mál fyri eyga, men vit bara hugna okkum og hava tað stuttligt.

Trummuspælarin hevur búð í Danmark í 6 ár. Í løtuni er hann í holt við at nema sær lærarautbúgving á Musikkonservatoriinum í Odense.

Fríði og Robbie Williams Jam verða at hoyra í Baren týskvøldið 9. apríl. Síðani fáa vit at síggja, hvussu nógv kemur við í sjónvarpið, men tað verður so ikki fyrr enn mikukvøldið 10. apríl.



*Baren 2002, sum verður send á TV3 í løtuni, hýsir 9. apríl einum føroyskum trummusláara. Tað er nevniliga 25 ára gamli Fríði Øster, sum saman við sínum bólki, Robbie Williams Jam, ið fer at sláa á trummurnar í Christianshavn*

# Smíðar alibát uttanfyri Toll og Skatt

**Bátasmiðjurin Kjartan Hansen úr Klaksvík smíðar ein alibát. Av tí at ongin høll er til slíkar verkætlanir, arbeiðir hann við at seta bátin saman úti**

BÁTASMIÐ
*Solby A. Eliasen*



*Alibáturin, sum Kjartan smíðar er fýra metrar breiður og tíggju og ein hálvan metur til longdar. Hann kostar um hálva aðru millión.*

**Klaksvík:** – Eg havi verkstað í garasjuni hjá mær, og har inni er ikki hugsingur um, at seta ein bát saman, sigur Kjartan Hansen, sum saman við øðrum ger ein alibát.

– So vit hava virkað alt inni í verkstaðnum fyri síðani at fara út at arbeiða víðari.

Tað er Vest Salmon, sum skal hava alibátin. Arbeiðið byrjaði fyrsta november og báturin verður væntandi liðugur um hálvan mei.

– Ein krani, sum vit skulu nýta, er seinkaður, men annars gongur alt, sum tað skal, og sum er, halda vit okkum til tíðarætlanina, sigur Kjartan, sum millum annað eisini hevur gjørt brúnna á Polarstjørnuni.

Hann greiðir frá, at tá ein skal fáast við slíkt arbeiði hesa ársins tíð, so má veðrið havast í huga, tá man ger tíðarætlanina, tí ongin ivi er um, at tað ger sítt til at seinka arbeiðinum.

– Um vit arbeiddu inni, so hevði arbeiðið helst ikki tikið meiri enn einar tveir mánaðir, heldur Kjartan.

– Men við tað, at eg havi møguleika til at virka øll stykkini inni, so er tað ikki so galið kortini. Og hesar seinastu dagarnar hevur veðrið verið avbera gott, so vit hava fingið nógv av skafti.

Alibáturin er úr aluminium og tað skal alt sveisast. Men tað tolir ikki vind og vætu, og so er alt sagt, tá hugsað verður um tað føroyska veðurlagið.

### Nógv arbeiði

Kjartan sigur, at hann fær nógvar fyrispurningar um at gera og umvæla bátar.

– Tað hevur verið nógv arbeiði seinastu trý árini, so nógv at um ein ikki av og á hevði tikið sær nakrar dagar frí, so hevði slettis ongin frídagur verið.

Kjartan væntar ikki, at føroyingar fara at smíða skip aftur her á landi.

– Gongdin er jú, at skrokkar verða gjørdir eystanfyri og so koma teir higar til útgerðan. Tað er so nógv bíligari at fáa skrokkar eystanífrá, so inntil eysturlendingar finna út av, at onnur gera sær dælt av teirra lágu prísum, so fara føroyingar og at bíleggja hálvvirkað heim, sigur Kjartan.

– Eg haldi eisini at handverkaragrundarlagið er ov lítið til at fáast við størri verkætlanir. Tí allir handverkarar hava sum nú er úr at gera. Men tað er eisini eitt tað fyrsta arbeiðið sum merkir niðurgongd, vísir hann á.

Av tí sama er tað sera torført at gera eina langtíðarætlan fyri bátasmið. Og hon skal til, heldur Kjartan, um hann skal gera sín dreym til veruleika. Hansara dreymur er, at hava ein stóran verkstað, har ein eisini kann seta bátar saman - ikki bert virka stykkini til.